






# Raðhús á Hamrinum á Argjum

Raðhúsið stendur í barnavinarligu gøtuni - Viðargøta úti á Hamrinum. Her er náttúru vakurt, frisælt og barnavinarligt. Dagstovnurin á Hamrinum liggur í haganum í vakra umhvørvinum - eisini er ein FIFA-sparkivøllur og eitt spælipláss, sum børnini kunnu gera brúk av í frítíðini.

Gott grannalag og vælvirkandi eigarafelag, sum skipar fyri felags antennuskipan og tiltøkum.

Raðhúsið er í trimum hæddum. Ì niðastu hæddini er durur við flísaløgdum gólvi við hita í, ein gongd, eitt stórt ítrivsrúm/kamar við egnari útgongd til túnið, eitt lítið rúm, vaski/ fýrrúm, ein stórur og góður hjallur og útgongd til eina terassu. Frá durinum er atgongd til eitt vesi, sum ikki er gjørt liðugt og her fylgir alt tilfarið við.

Á terassuni, sum er aftanfyri húsið, lívir væl. Her kanst tú i frið og náðum njóta tær góðu løturnar.

Í miðhæddini er ein gongd, køkur, grovkøkur og stova við karnap. Køkurin er ikki stórur, men arbeiðsvinarligur. Víðari inn frá køkinum er ein grovkøkur. Her er nógv skápspláss og gott borðpláss. Stovan er stór og rúmlig og frá teimum stóru stovuvindeygunum kanst tú njóta tað framúr góða útsýni yvir Nólsoyarfjørð, Havnina, Havnarvág og Eysturoynna.

Í ovastu hæddini er gongd, baðirúm, trý kømur. Baðirúmið er klætt við sveisað vinyl.

Allar hurðarnar eru træ fyllingshurðar. Loftini og vindeyguni eru somuleiðis úr træ.

Eitt lítið ovastaloft er, sum kann brúkast sum goymslurúm.

Parkeringsmøguleiki er til tveir bilar í túninum frammanfyri høvuðsdyrnar.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 357400.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adr: | Viðargøta 46 |
| Byggiár: | 2000 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 189 fermetrar |
| Grundøkið: | 202 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.400.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**